# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Karstin Danielsen, Strendur**, fer til grav-ar úr Sjóvar kirkju, hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Karstin, kunnu lata nýggja Missiónshúsinum á Strondum eina peningagávu, konta í Eik ella Føroya Banka.

**Poul Johnnes Andreasen**, ættaður úr Vík, búsitandi í Vági andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin, 79 ára gamal.

**Dagurin 11. desember.**
**Damasus**, deyður ár 384. Diakonur hjá pávanum Liberiusi og varð sjálvur valdur til páva eftir hann. Hann er fyrst og fremst kendur sum tann, ið álegði Hieronymusi at týða bíbliuna av nýggjum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Minningarorð um Finn Helmsdal

**borin fram á tingfundi 11. des. 2008**



Fríggjadagin 5. desember 2008 andaðist Finnur Helmsdal, fyrrverandi løgtingsmaður, 56 ára gamal.

Finnur Helmsdal var føddur 20. apríl 1952 í Tórshavn. Hann var sonur Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðing, sum var ættaður úr Leynum og Oliviu Helsmdal, sum var ættað úr Miðvági. Finnur var giftur við Jóruni Højgaard úr Vestmanna. Tey eiga 4 børn.

Finnur Helmsdal varð útbúgvin sosialráðgevi í 1980, og í 1998 tók hann prógv sum exam. art. í søgu og søguvísind á Fróðskaparsetrinum.

Hann hevði sítt borgarliga yrki innan almannaverkið. Eftir lokna útbúgving starvaðist hann sum sosialráðgevari á Almannastovuni, og í 1985 gjørdist hann leiðari á Andveikraverndini. Í 1994 fór hann aftur í starv á Almannastovuni, til hann í 2002 gjørdist leiðari á Barnaheiminum.

Hann sat eisini eitt skiftið í ættleiðingarráðnum og í ráðnum fyri brekað.

Finnur var ítróttarmaður burturav, og var øll síni yngri ár sera virkin innan hondbólt og fótbólt. Tey seinastu mongu árini var hann ítróttarskrivari á Oyggjatíðindum, og í útvarpi og sjónvarpi var hann eisini fastur viðmerkjari til fótbóltsdystir burturi og heima.

Harafturat skrivaði hann nógv um heimligan og útlendskan ítrótt í bløðum og bókum, og í 1991 kom bókin Reytt og blátt og hvítt út.

Finnur gjørdist politiskt virkin í 1990´unum, og var hann eitt skifti varamaður í Tórshavnar býráð. Hann sat á tingi sum varamaður frá 1998 til 2002, og hann varð valdur á ting fyri Tjóðveldisflokkin í 2004, har hann sat til 2009, tá hann aftur gjørdist varamaður, til hann í august bað um faloyvið av sjúkuávum.

Finnur hevði korini hjá teimum, sum høvdu hjálp fyri neyðini, við sær innum tinggátt. Hann var í politiska virki sínum ein eyðsýniligur sosialur profilur, og eingin ivi var um, at hjartað hansara var hjá teimum minni mentu í øllum lutum.

Finnur Helmsdal var tjóðskaparmaður burturav, og hann stríddist við eldhuga fyri, at samfelag okkara skuldi rúmað øllum føroyingum, eisini tá harðast leikaði á, og hóast tað kundi fáa avleiðingar bæði fyri hann sjálvan og fyri flokkin, hann umboðaði.

Hann var heilur har hann var, og á tingi vistu vit altíð, hvar vit høvdu hann.

Tað var ein virkin tingmaður úr okkara hópi, sum nú setti førningin frá sær, tí hervilig sjúka hevði fingið fastatøkur á honum. Hann stríddist av øllum alvi fyri at vinna sær heilsuna aftur, men gjørdist ov stuttur.

Latum okkum í tøgn minnast Finn Helmsdal.

**Løgtingsformaðurin**

# Føroysk jólamøti í Jútlandi

**Samkoman Malta í Hirtshals bjóðar til føroysk jólamøti í Esbjerg, Sønderborg og Vejle í vikuskiftinum 12. til 14. desember**

Elsa og Poul Jóhan Djurhuus eru nú á Malta, í Hirtshals, og loysa Grethu og Levi Joensen av, sum eru farin til Føroya. Tey verða á Malta til mars mánaða, tá Levi og Gretha taka við aftur.

Malta bjóðar til føroysk jólamøti í Esbjerg, Sønderborg og Vejle. MC Restorf og Hans Jakup á Lava spæla og syngja á øllum møtunum. Eisini verður tala og vitnisburður, har m.a. Poul Jóhan Djurhuus kemur at luttaka í talu. Tað er jólamánin, og tí verður bjóða til drekka eftir hvørt møti við føroyskum viðskera.

Germ Hansen, av Toftum, sum hevur búð nógv ár í Sønderborg, hevur 75 ára føðingardag, sama dag sum føroyska møti er í Sønderborg.

Germ og Bodil hava í mong ár havt ábyrgdina av at klárgera hølini til møtini, og hvønn mánaða vitjar Germ millum 70 og 80 føroyskar adressur í Sønderborg við eini innbjóðing til møti, sum hann sjálvur skrivar og printar út. Vit á Malta eru teimum ógvuliga takksom fyri hesa trúføstu tænastu. Germ arbeiddi fleiri ár sum vitapassari í Sønderborg inntil hann fór frá vegna aldur. Germ verður við á møtinuim í Sønderborg og tá verður høvið at heilsa upp á hann og konuna.

**Skráin: Esbjerg**, fríggjakvøldið 12. desember kl.19.30 í Mølleparken, Spangbjerg Møllevej 16 c
**Sønderborg**, leygarkvøldið 13. desember kl.19.00 í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28
**Vejle**, sunnudagin 14. desember kl.17.00 í hølunum hjá Frelsunarherinum í Staldgårdsgade 4

Vit fara at heita á tykkum heima, sum kenna føroyingar í Jyllandi, at boða teimum frá møtunum.

Um onkur vil vita meiri um møtini, er ein vælkomin at ringja á telefon: +298 228314 ella 98944370 ella gjaranes@post.olivant.fo

*Poul Jóhan Djurhuus*
*Gjaranes@post.olivant.fo*

